# Inn við bygging til eldri eftir tørvi – burtur við vitleysari røktarheimsbygging!

TURIÐ JACOBSEN



Enn er ikki ov seint at støðga á við vitleysu røktarheimsútbyggingini, sum spreiðir seg um alt landið og í staðin fara í gongd við at leggja ætlanir at byggja eldrabústaðir og -miðstøðir, sum hóska til tørvin og ynskini hjá verðandi og komandi eldru ættarliðum.

Í tíðindunum frætta vit javnan um ovurnýtslu á almannaøkinum og um, hvussu Almannamálaráðið stríðist við at finna aðrar inntøkur og skarva av útreiðslunum. Nýggjasta inntøkukeldan er at áleggja pensionistum økt gjald fyri tænastur. Samstundis sum tað táttar í fíggjarliga, veitir Almannamálaráðið kommununum stuðul til at byggja røktarheim og sonevnd eldrasambýli um alt landið, sum bæði eru óneyðuga kostnaðarmikil og hoyra eini farnari tíð til. Tað hongur also ikki saman.

Vit eru alt fleiri, ið øtast yvir røktarheimsbyggingina, sum er við at fara av bakkastokki. Sum mangan hevur verið frammi seinastu tíðina, verða røktarheim av slagnum, sum eru í umbúnað at verða bygt, niðurløgd aðrastaðni. Hetta verður gjørt út frá væl grundaðum kanningum, sum vísa, at:

- røktarheim eru dýr bæði í rakstri og íløgum
- tey passivisera fólk, so tey verða meira røktarkrevjandi
- eldri fólk í dag ynskja at liva eitt virkið lív sum longst í egnum heimi

Aðrastaðni verður tí strembað eftir, at fólk, sum orsakað av t.d. ellisbreki ikki kunnu búgva í egnum heimi, skulu hava ymisk bústaðartilboð at velja ímillum. Bústaðartilboð og tilknýttar tænastur, sum hóska júst til teirra tørv og førleikastøði og sum leggja upp til og loyva teimum at vera virkin í gerðandisdegnum, so tey varðveita førleikar.

Í byggingunum, sum okkara kommunalu og almennu myndugleikar nú seta í gongd, verða bæði faklig vitan og tørvurin og ynskini hjá borgarunum skúgvað til viks. Í staðin grundgeva kommurnar fyri røktarheimsbyggingini við stuðulsmøguleukum frá tí almenna og at røktarheim skapa arbeiðspláss. Og hvørjar grundgevingar hevur almannaverkið so?? Ja, tað er ein góður spurningur, tey hava nakrar lógir - ótíðarhóskandi - um reglar fyri røktarheim og eldrasambýli. Hesar verða av og á broyttar eitt sindur, óvist eftir hvørjum leisti, men halda grundleggjandi fast í og stuðla upp undir byggingina, sum hon hevur verið higartil.

Ein orsøk til, at kommununar vilja hava ábyrgdina av eldraøkinum siga tær vera, at tær eru nærri borgarunum og kenna borgarans ynski og tørv. Hvussu hongur tað saman við, at kommunurnar samstundis byggja og planleggja ímóti ynski og tørvi hjá borgarunum?

Bæði kommunali og almenni parturin av fíggingini av íløgum og rakstri eru í seinasta enda borgarans skattakrónur, sum - alment ella kommunalt - skulu fíggja somu tænastur til somu borgarar. Fyri meg sum skattgjaldara, hevur tað ongan týdning, um mín skattur fer í kommunu- ella almannakassa, bara samlaða puljan verður gagnnýtt so væl sum gjørligt.

Tað verður hon ikki, tá talan er um tænastur til eldraøkið frá kommunum og almannaverki. Tosað verður um, at "vit", kommunan, fær stuðul til íløgur til at byggja búpláss frá "teimum", almannaverkinum. "Tey", almannaverkið, fíggjar rakstur av ymiskum slag og "vit" kommunan spjaðar til. Afturat hesum kemur umfatandi kostanaðurin av at umsita hetta peningarensl millum almannaverk og kommunur. Í hesum transaktiónunum er fokusið langt síðan flutt frá borgaranum til skipanirnar og úrslitið verður har eftir. Sum skattgjaldari vænti eg av teimum, sum av egnum vilja hava átikið sær at umsita mínar skattakrónur, at tey hevja seg upp um hendan mátan at síggja sín leiklut uppá.

Ikki einans hava tey hendan hugburðin til borgarans skattakrónur. Við at byggja ótíðarhóskandi røktarheim og sambýli, brúka tey harafturat, ella kanska júst tí, pengarnar til at fíggja kostnaðarmiklar tænastur til borgaran, sum borgarin hvørki ynskir ella hevur tørv á. Mann kundi sagt, sum Jesus á krossinum " harri fyrigev teimum, tí tey vita ikki, hvat tey gera", men tað kann mann jú ikki, tí tey vita - ella eiga at vita - at hendan gongdin er skeiv og at teirra skeivu avgerðir fáa óhepnar avleiðingar fyri alt eldraøkið framyvir.

Eg havi meira enn so hoyrt um kanningarferðir hjá kommunum og almannaverki uttanlanda, har tey hava hugt at, hvussu almanna- og eldraøkið er skipað aðrastaðni. Veit eisini um útnorður samstarv, sum bæði kommunur og almannaverk seinastu skjótt mongu árini hava luttikið í um økið. Tað hevði nú verið stuttligt at sæð okkurt ítøkiligt aftur av øllum tí áhugaverda og nýhugsandi, sum tey hava hugt at og hoyrt um í stóru verð.

Kanska tað hevði hjálpt, um tey, sum sita við valdinum, ímynda sær, hvussu avgerðirnar, sum tey nú taka, fara at ávirka teirra egnu ellisár. Tað er jú ikki óhugsandi, at avleiðingarnar av avgerðunum falla aftur á tey sjálvi, um tey einaferð koma í ta støðu, at tey verða noydd at flyta úr egnum heimi. Við núverðandi gongd verður einasta tilboðið til teirra røktarheim, har tú illa fært verið virkin og missir sjálvsavgerðarrætt og privatlív. Røktarheim, sum harafturat mangan verða løgd í útjaðaranum av bygdum øki, uppi undir bøgørðunum og aðrastaðni, næstan "uttanfyri landa lóg og rætt", har møguleikin at luttaka í tí, sum fyriferst í samfelagnum, er avmarkaður.

Mong, sum í dag búgva á røktarheimi og heimabúgvandi, sum sigast at koma undir katagoriina røktarheimskrevjand, hava als ikki tørv á hesum slagnum av røktarheimi. Summi høvdu kunnað búð í egnum heimi, um tænasturnar til heimabúgvandi vóru útbýgdar og onnur hava tørv á eldraíbúð.

Tíbetur er enn tíð at støðga vitleysu røktarheimsútbyggingunum. Lat okkum gera tað og sum skjótast fara í gongd við neyðugu umskipanina av økinum so sum at útbyggja tænasturnar til heimabúgvandi og at brúka pengarnar, sum ætlaðir eru til røktarheimsbygging, til at byggja hóskandi eldramiðstøðir við ymiskum sløgum av eldraíbúðum, virkistilboðum v.m.

Vit eru so heppin, at okkum ikki nýtist at kanna, um hetta nú loysir seg, hetta er vælgrundað vitan í okkara grannalondum - talan er sostatt ikki um okkara so væl kendu skuffuálit. Harafturat hava vit í Føroyum hópin av fakfólki við viðkomandi vitan innan økið, sum bara bíða eftir, at boð verður eftir teimum, so vitanin kann gagnnýtast. So tá tað kemur til stykkis, er ljós fyri framman, tað raður bara um at lata eyguni upp fyri tí og loyva tí framat!

# Heilsupolitikkur

HUXA

HUXA meinar, at Sjúkrahúsverkið er alt ov vánaligt og veitir ikki tíðarhóskandi tænastur við tí dygd, sum borgarin setur sum minstamark í dag. Sjúkrahúsverkið virkar sum eitt monopol, ið ikki er útsett fyri kapping, og tískil verður tørvurin hjá fólkinum ikki nøktaður. Sjúklingurin kann ikki sjálvur velja hvørja viðgerð, hann vil hava, og hvar hann vil hava hana. Bíðitíðin at fáa viðgerð er alt ov long, og tískil hevur sjúklingurin ikki nøktandi viðgerðatrygd. Tí mælir HUXA til, at sjúkrahúsverkið og kommunulæknaskipanin verða privatiserað við tí fyri eygað, at sjúkrahúsið og kommunulæknarnar verða útsett fyri kapping, so viðgerðar- og tænastugóðskan gerst betur. HUXA meinar tó ikki, at sjúkrahúsverkið og kommunulæknaskipanin skulu skipast eftir amerikanskum leisti, og tessvegna skal sjúkrakassaskipanin virka á sama hátt sum áður.

HUXA ynskir, at pengarnir skulu fylgja sjúklinginum og ikki viðgerðarstovnunum.

Sum nú er fáa sjúklingar fráboðan saman við sjúkrameldingini, at teir ikki fáa arbeitt innan ávís øki. Fyri at skapa bestu fyritreytir hjá øllum at arbeiða, eigur læknin heldur at siga frá, hvat sjúklingurin fær arbeitt við, so hann best møguligt kann aktiverast á arbeiðsmarknaðinum.

Við hesum mælir HUXA til, at

- Upplýsing skal raðfestast høgt
- Lógarásett mørk skulu setast fyri bíðitíð til viðgerðir á sjúkrahúsinum. Sjúklingurin skal tryggjast viðgerð innan rímiligt tíðarskeið. Um hetta ikki er møguligt, skal sjúklingurin kunna fáa viðgerð aðrastaðni innan fyri omanfyristandandi mørk.
- Sjúkrahúsið skal flytast frá tí almenna, so tænasturnar og viðgerðirnar til sjúklingin mennast í sunnari kapping.
- Kommunallæknaskipanin skal privatiserast.
- Sjúkratryggingin skal styrkjast og tillagast privatum sjúkrahúsum og kommulæknaskipanum.

**Útbúgvingarpolitikkur**

Tað er hugsanin hjá HUXA, at útbúgving er hornasteinurin í føroyska samfelagnum.

Vit meta, at størsta menningin í einum samfelagi liggur í menningini av tí einstøku menniskjuni.

Vit meta tí, at tað er sera týdningarmikið, at eingin búskaparlig forðing skal vera fyri at nema sær eina útbúgving og ta útbúgvingina, einum hevur hug og tørv á. Lestrarlønin í dag er nógv ov lág bæði hjá heima- og útibúgvandi. Tað er nærum ógjørligt at gjalda fyri bæði dagligar útreiðslur og skúlaútreiðslurnar bara við lestrarstuðulinum.

Skúlaskipanin virkar í dag meira ella minni sum ein top-down skipan. Hon verður stýrd frá toppinum meira ella minni uttan ávirkan frá næmingum og foreldrum teirra. Vit meta, at tað stórliga er neyðugt, at næmingar og foreldur at teimum fáa størri ávirkan á sínar egnu umstøður.

Samansetinigin av miðnámsskúlaútbúgvingunum í dag er ómetaliga einstátta og smøl. Modernaða samfelagið hevur brúk fyri fólki við serfrøðiligari vitan heldur enn fjølbroyttari, og hesum hóska føroysku miðnámsskúlaútbúgvingarnar ikki til. Tí meta vit, at tað er týdningamikið, at næmingar fáa størri ávirkan á samansetingini av teirra miðnámsskúlaútbúgving – eisini tvørtur um skúlarnar, soleiðis at eitt nú ein studentaskúlanæmingur fær tikið handilsligar lærugreinar.

Lærarar virka í dag ómetaliga einsamallir. Teir starvast einsamallir í afturlatnari skúlastovu uttan møguleika fyri fakligari respons av arbeiðnum. Orsakað av hesum gerst teimum lætt at sleppa sær undan at menna og modernisera sínar arbeiðshættir, ið er stórliga týdningarmikið fyri næmingin, ið skal víðari út útbúgvar- og arbeiðslívið, har menningin og modernisering er í hásæti. Tí meta vit, at tað er týdningarmikið, at lærarar verða eftirmettir, so vit kunne senda okkara næmingar víðari út í lívið við bestu og mest framkomnu førleikunum, vit kunna.

Somuleiðis fyri at eggja og menna næmingin, er tað okkara hugsan, at teir skulu verða eftirmettir longu frá 1. fyrsta skúlaári. Tað er týdningarmikið at staðfesta støðið á næminginum, so best ber til at bøta um teir trupulleikar, ið kunnu vera. Sostatt ber til at eggja og menna teir góðar, ið eru. Hetta gevur samstundis næminginum ein úrslitsbaseraðan hugburð, ið ímyndar restina av samfelagnum.

Fyri at geva fólkaskúlanæmingunum bestan lærdóm, meta vit, at næmingatalið per lærara ikki skal fara upp um 15. Hetta ger, at lærarin hevur betri sømdir at læra og menna einstaka næmingin.

Almennu veitingarnar skulu vera so tætt borgarunum, sum gjørligt, og tískil skulu fólkaskúlarnir gerast kommunal ábyrgd.

Tískil meta vit, at:

- Lestrarlønin skal hækkast til kr. 4500,- fyri øll miðnámslesandi
- Næmingar / Foreldur størri ávirkan á skúlaskipanina.
- Eftirmeting av lærarum er neyðug.
- Eingin fíggjarlig forðing skal vera fyri at nema sær útbúgving.
- Næmingurin skal mest møguligt samanseta sína egnu miðnámsskúlaútbúgving.
- Í fólkaskúlanum skal talið á næmingum pr lærara ikki fara upp um 15.
- Royndir og støðumet skulu vera í fólkaskúlanum frá 1. flokki.
- Pengarnir skulu fylgja næminginum og ikki stovninum – hetta fyri at stuðla upp undir privatskúlum.
- Fólkaskúlarnir gerast kommunal ábyrgd.